# Álit

## Skipan av barnaansingarøkinum

# INNIHALDSYVIRLIT

SKIPAN AV BARNAANSINGARØKINUM.......... 3

BARNAANSINGARØKIÐ SEINASTU 10 ÁRINI.......... 3

ÚTREIÐSLURNAR SEINASTU 10 ÁRINI: .......... 3

BARNAANSINGARØKIÐ Í DAG.......... 4

ARBEIÐSBÓLKURIN.......... 4

NIÐURSTØÐA OG TILMÆLI FRÁ ARBEIÐSBÓLKINUM. .......... 5

AVLEIÐINGAR AV TILMÆLINUM FYRI LANDIÐ OG KOMMUNUNAR. .......... 6

SKJAL 1. SØGULIGT YVIRLIT YVIR LÓGINA UM BÝTIÐ AV ALMANNAÚTREIÐSLUNUM. .......... 8

NÚVERANDI LÓG.......... 9

SKJAL 2. LL. NR. 125 FR 21.05.1993 UM BÝTIÐ AV ALMANNAÚTREISLUM V.M.......... 10

SKJAL 3. YVIRLIT YVIR HVAT KOMMUNURNAR RINDA SAMBÆRT LÓGINA UM BÝTIÐ AV ALMANNAÚTREIÐSLUM, YVIR MEIR- OG MINNI ÚTREIÐSLUR HJÁ KOMMUNUNUM UM LÓGIN VERÐUR AVTIKIN OG BARNAANSINGIN VERÐUR LAGT ÚT TIL KOMMUNURNAR. .......... 11

SKJAL 4. YVIRLIT YVIR DAGSTOVNAR OG DAGRØKTIR Í 1999. .......... 13

SKJAL 5. FRAMROKNINGAR ÁR 2000. .......... 15

**Skipan av barnaansingarøkinum.**
Landsstýrismaðurin í almannamálum setti fyrst í januar 1999 ein arbeiðsbólk at arbeiða við eini loysn á barnaansingarøkinum við tí fyri eyga at gera uppgávu-, heimildar- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunu greiðari.

Sambært § 32 í " Lov for Færøerne om børneforsorg jfr. Socialministeriets lovbekendtgørelse nr. 104 af 2. marts 1988, sum seinast broytt við Ll. nr. 163 frá 29. desember 1997 er heimild at seta á stovn dagstovnar, dagrøktir, døgnstovnar og frítíðarskúlar.

Í kunngerð nr. 62 frá 1. apríl 1993 um dagstovnar, dagrøkt og døgnstovnar fyri børn og ung er ásett um virksemi, rakstur o.t. hjá hesum stovnum.

Fíggingin av barnaansingarøkinum er sambært § 43 í barnaforsorgarlógini at landið fíggjar 40%, kommunurnar 30 % og foreldrini 30%. Við lógarbroyting frá 1. jan. 1998 er ásett, at landið rindar 35%, avvarandi kommuna 35% og foreldrini 30% .

Hetta prosentbýtið fer úr gildi aftur 31.12.1999, tá prosentbýtið aftur verður 40% til landið, 30% til kommunurnar og 30% til foreldrini.

## Barnaansingarøkið seinastu 10 árini.
Útreiðslurnar innan barnaansingarøkið á fíggjarlógini eru øktar nógv tey seinastu 10 árini. Kommunurnar hava á hvørjum ári søkt landsstýrið um uppnormering av dagrøktarplássum og tørvurin tykist at økjast fyri hvørt ár.

## Útreiðslurnar seinastu 10 árini:

| Ár | Rakstrarútreiðslur tús. kr. | Húsaútreiðslur tús. kr. | Útreiðslur íalt tús. kr. | Partur landskassans |
|---|---|---|---|---|
| 1989 | 76.594 | 8.771 | 85.365 | 35.900 |
| 1990 | 87.081 | 14.341 | 101.422 | 43.437 |
| 1991 | 84.414 | 22.873 | 107.287 | 47.489 |
| 1992 | 84.788 | 23.584 | 108.372 | 48.066 |
| 1993 | 78.071 | 21.345 | 99.416 | 44.035 |
| 1994 | 78.357 | 21.329 | 99.686 | 44.140 |
| 1995 | 75.167 | 20.477 | 95.644 | 42.353 |
| 1996 | 83.697 | 20.021 | 103.718 | 45.491 |
| 1997 | 94.585 | 22.636 | 117.221 | 51.416 |
| 1998 | 106.684 | 26.371 | 133.055 | 53.162 |
| 1999 | 123.817 | 22.107 | 145.924 | 56.600 |

Sum tað framgongur av yvirlitinum vaksa útreiðslurnar við umleið 21 mill. kr. frá 1989 til 1999. Fram til 1997 gekk landsmyndugleikin øllum umsóknunum frá kommununum á møti um uppnormering av dagrøktarplássum og stovnsetan av dagstovnum.

Í 1992 tá fíggjarkreppan byrjaði, rakti sparingin eisini barnaforsorgarøkið. Kommunurnar høvdu ikki fígging til tað normeringina sum teimum var loyvt, og skorið tí niður uppá dagrøktarpláss og í summum førum var dagrøktin niðurløgd.

Hetta viðførdi fyri landskassan, at útreiðslurnar á løgtingsinsfíggjarlógini minkaði við umleið 6 mill. kr. frá 1992 til 1995.

Um hetta mundi varð barnaansingarøkið eisini endurskoðað umsitingarligt. Hvør stovnur og hvør dagrøkt hevði havt sína egnu reglugerð og fyri at umsitingin á økinum skuldi gerast einfaldari og eftirlitið hjá Almannastovuni betri, vóru standardreglugerðir gjørdar fyri allar dagstovnar og allar dagrøktir.

## Barnaansingarøkið í dag.

Tá fíggjarlógin fyri fíggjarárið 1999 varð samtykt gjørdist greitt, at peningur fór at mangla í á rakstrarstaðnum til barnaansing. Í Almanna- og heilsumálastýrinum lógu fleiri umsóknir um uppnormering av dagrøktarplássum o.a. frá kommunum sum ikki vóru íroknaðar tær 56.1 mill. kr. ið vóru avsettar áðrenn eykajáttanin kr. 500.000,- vóru latnar økinum.

Almanna- og heilsumálastýrið viðgjørdi allar umsóknirnar ið vóru innkomnar við tí fyri eyga, at finna bráfeingis tørvin kring landið. Komið varð fram til, at bráfeingis tørvurin kostaði 500.000,- kr. meira enn tað ið longu var avsett.

Almanna- og heilsumálastýrið søkti løgtingið um eina eykajáttan til fígging av landsins parti av hesum umsóknum, og landsstýrismaðurin í almannamálum fekk eisini eina tilsøgn frá samgonguni um eykajáttan kr. 500.000,-. Upphæddin til barnaansingin á fíggjarlógini fyri 1999 er tí 56.5 mill. kr.

Men áðrenn eykajáttanin varð latin, setti samgongan ávísar treytir til landsstýrismannin í almannamálum. Treytirnar hjá samgonguni vóru, at útreiðslurnar til barnaansing á fíggjarlógini ikki skulu økjast meira enn tær nú 56.6 mill. kr og at heimild skuldi ásetast í lógini , at kommunurnar kunnu seta virksemi í gongd uttan um galdandi fíggjarbýti millum land, kommunu og foreldur.

Fyri at lúka hesar treytir og finna eina loysn uppá hvussu barnaansing skuldi skipast bæði fíggjarliga og umsitingarliga í framtíðini, avgjørdi landsstýrismaðurin í almannamálum, at seta ein arbeiðsbólk at arbeiða við hesum spurningi.

## Arbeiðsbólkurin.

Avgjørt varð, at arbeiðsbólkurin skuldi verða mannaður við umboðum úr: Almanna- og heilsumálastýrinum, Løgmansskrivstovuni, Fíggjarmálastýrinum, Býarfelagnum og Føroya Kommunufelag.

Arbeiðsbólkurin skuldi koma við einum tilmæli til landsstýrismannin um eitt greiðari býtið millum land og kommunu og hvussu uppgávu-, fíggjar- og ábyrgdarbýtið skal verða í framtíðini.

Umboðini í bólkinum eru:
Almanna- og heilsumálastýrið: Aibritt á Plógv, Súsanna Nolsøe og Karsten Saxov.
Løgmannsskrivstovuni: John Rajani.
Føroya Býarfelag: Jens Marius Poulsen.
Føroya Kommunufelag: Jacob Vestergaard.
Fíggjarmálastýrið: Atli Leo.

Arbeiðsbólkurin varð samdur um, at viðgera niðanfyrinevndu spurningar:

- **Hvussu skal upphæddin, ið játtað er á fíggjarlógini fyri 1999 býtast millum kommunurnar í framtíðini? Hvør býtislykil skal brúkast? ella skal játtanin til barnaansingarøki av fíggjarlógini næsta ár ?.**
- **Hvussu kann uppgávubýtið millum land og kommunu gerast greiðari?**
- **Skal lógin "Býtið av almannaútreiðslum" broytast ella avtakast?**
- **Skal skattaprosentið hjá kommununum hækkast og skattaprosentið hjá landinum lækkast tilsvarandi?**

Arbeiðsbólkurin avgjørdi at hyggja eftir teimum lógarbundnu útreiðslunum sum kommunurnar hava sambært lógini um býtið av almannaútreiðslum har kommunurnar gjalda 6,75% og landið 93,25%. Hetta yvirlitið verður hjálagt sum skjal nr. 3.

## Niðurstøða og tilmæli frá arbeiðsbólkinum.

Lógin um býtið av almannaútreiðslum gevur landskassanum eina inntøku uppá uml. 61 mill. kr. ímeðan barnaansingin kostar landskassanum 56.6 mill. kr. í 1999 (eykajáttanin íroknað).

Sambært fíggjarlógini fyri fíggjarárið 1999 kann kommunurnar partur av almannaútreiðslunum útgreinast soleiðis:

| Upphædd í mió. kr. | |
|---|---|
| Fólkapensjón | 19.208 |
| Avlamispensjón | 9.702 |
| Einkjupensjón | 127 |
| Barnaforsorg | 2.198 |
| Almenn Forsorg | 5.986 |
| Heimarøktin & heilsusystrar | 3.620 |
| Einkjubarnastyrkur & alimentatión | 116 |
| Røktar,- ellis- og vistarheim | 18.718 |
| Eldrarøkt í Sandoynni [1] | 1.270 |
| Vard Verkstøð | 790 |
| **Kommunurnar at gjalda íalt** | **61.735** |

Tá ið inntøkan hjá landskassanum sambært lógini um býtið av almannaútreiðslunum samsvarar nøkulunda við útreiðslurnar hjá landskassanum til barnaansing, metir arbeiðsbólkurin, at ein loysn uppá ógreiða býtið millum land og kommunu á barnaansingarøkinum er, at avtaka lógina um býtið av almannaútreiðslunum og geva kommununum alla ábyrgdina á barnaansingarøkinum.

Við at velja hesa loysn, verður barnaansingin bæði fíggjarliga og umsitingarliga kommunal og ikki ein útreiðsla bæði á landsins fíggjarlóg og fíggjarlógini hjá kommununum. Tær lógarbundnu útreiðslurnar verða á henda hátt fíggjaðar av landinum burturav.

Umboðini fyri kommunurnar hava undir øllum tjakinum lagt stóran dent á, at ábyrgd- og avgerðarætturin á barnaansingarøkinum fylgist at og í hesum sambandi hava umboðini fyri

---

[1] Útreiðslurnar eru ásettar við kunngerð nr. 167 frá 29/12-1997 um royndarskipan innan eldrarøkt í Sandoynni.

kommunurnar lagt dent á, at uppgávurnar, sum verða fluttar frá landinum til kommunurnar, ikki skulu kompenserast við blokkstuðul, men heldur um skattin.

Umboðið fyri býarfelagið vísti á, at skipanin við blokkstuðli sum Danmark hevur, hava danskar kommunur sera ringar royndir av. Sagt verður, at tá samráðingar um upphæddina á blokkinum fara fram í Danmark, verður blokkurin skorin niður og álagt verður kommununum at finna inntøkur aðrastaðni.

**Niðurstøðan hjá arbeiðsbólkinum er tí, at mælt verður til:**
- at avtaka lógina um býtið av almannaútreiðslum galdandi frá 1. jan. 2000,
- at seta 0,- kr. á løgtingsfíggjarlógina fyri barnaansingarøkið frá 1. jan. 2000,
- at kommunurnar í framtíðini fáa kompensera meirútreiðslur um skattin.
- at mæla til, at settur verður ein arbeiðsbólkur at arbeiða við eldraøkinum beinanvegin.

Semja var eisini um, at mæla til, at tá uppgávurnar viðvíkjandi barnaansing verða fluttar til kommunurnar, skal landið gera minimumsreglur á økinum sum kommunurnar skulu halda seg til. Hesar reglur skulu tó gerast í samráð við kommunurnar og skulu m.a. áseta viðurskifti s.s.: upptøkutreytir, reglugerðir, foreldragjald, góðkenning av starvsfólki, sáttmálaviðurskifti, eftirlit v.m.

## Avleiðingar av tilmælinum fyri landið og kommununar.

Fíggjarliga avleiðingin fyri landið í ár 2000 við at avtaka lógina um býtið av almannaútreiðslum og verandi prosentbýtið heldur fram vil verða, at landið hevur eina minniinntøku uml. 5 mill. kr. í ár 2000 enn í 1999.

Verður eingin játtan til barnaansingarøkið á fíggjarlógini ár 2000 hevur landið harafturímóti eina minniútreiðslu uppá uml. 10 mill. kr. Víst verður til skjal nr. 5 um framrokningar ár 2000. Sambært hesi framrokning sum tekur støðu í verandi virksemi og 40 % í landskassapart til rakstur av barnaansingarøkinum, eru útreiðslurnar fyri landskassan øktar við 10 mill. kr. frá 56.6 mill. kr. upp í 65.3 mill. kr.

Fíggjarliga avleiðingin fyri kommunurnar við at avtaka lógina um býtið av almannaútreiðslunum er, at nakrar koma at hava eina minniútreiðslu og aðrar eina meirútreiðslu. Víst verður til skjal nr. 3.

Eisini verður avleiðingin fyri kommunurnar, um lógin um býtið av almannaútreiðslum verður avtikin, at landið yvirtekur fíggingina av kommunalum og felagskommunalum stovnum s.s. ellis- og røktarheimum og fólka-, avlamis- og einkjupensiónum Hetta kann tykjast løgið, tá landið stendur fyri fíggingini av rakstrinum, meðan kommunurnar standa sum eigarar av bygningunum.

Umboðini fyri kommunurnar í arbeiðsbólkinum hava í hesum sambandi víst á, at neyðugt er at seta ein arbeiðsbólk at arbeiða við eldraøkinum beinanvegin. Endamálið við bólkinum er, at finna eitt greiðari býtið á eldraøkinum, og møguliga flyta økið til kommunurnar eisini.

Í hesum sambandi verður eisini víst til Kommununevndina sum gjørdi álitið um nýggja kommunuskipan. Álitið vísir á, at eldraøki er eitt øki sum eisini kundi í framtíðini verið lagt út til kommununar. Tí verður heitt á landsstýrismannin í almannamálum um at seta ein arbeiðsbólk beinavegin sum skal koma við einum tilmæli um hvør skal hava fíggjarliga og umsitingarliga ábyrgd av eldraøkinum í framtíðini.

Tórshavn tann 9. juli 1999.

Vegna arbeiðsbólkin:

| | |
|---|---|
| Aibritt á Plógv | Karsten Saxov |
| Súsanna Nolsøe | John Rajani |
| Atli Leo | Jens Marius Poulsen |

Jacob Vestergaard

## Skjal 1. Søguligt yvirlit yvir lógina um býtið av almannaútreiðslunum.

Blokkstuðulsskipanin frá 1. januar 1988 broytti ymiskt innan útreiðslubýtið á almannaøkinum. Pensjónsútreiðslurnar av fólka-, avlamis- og einkjupensjónum skuldu endurrindast við 50% sum áður, men á øllum øðrum økjum, t.d. dagpeningi, forsorg, barnaforsorg, veitingum annars sambært pensjónslógunum, varð endurrindanin frá ríkiskassanum broytt til 25%.

Rakstrarútreiðslurnar til ellis- og røktarheim skuldi nú rindast 100% av heimastýrinum.

Av rakstrarútreiðslunum til dagstovnar rindar ríkið 25%, viðkomandi kommuna 30%, foreldur 30% og landskassanum 15%. Av húsaútreiðslunum til dagstovnar rindar ríkið 25%, og heimastýrið 75%. Býtislógin frá 1978 var nú ógjørlig at umsita, eftir at blokkstuðulsskipanin var komin.

Landsstýrið boðaði nú frá, at útrokningin av útreiðslubýtinum skuldi fara fram á slíkan hátt, at kommunurnar hvørki skuldi verða betur ella verri fyri, enn áðrenn blokkstuðulsskipanin varð sett í verk.. Í praksis varð hildið fram at býta millum land og kommunu, sum áðrenn blokkstuðulskipanina, við undantaki av húsaútreiðslunum til dagstovnar, har kommunuparturin uppá 3/7 varð umroknaður til 40%. (3/7 = 42,86%).

Nýggj lóg um býtið av almannaútreiðslunum kom fyrst í gildi 24. juni 1992 og varð galdandi frá og við fíggjarárinum 1991. Ásett verður, at av føroyska partinum av útreiðslunum til fólka-, avlamis- og einkjupensjón, forsorgar- og barnaforsorgarútreiðslur til einstaklingar, heimahjálpútreiðslur, barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl., rakstur av røktar-, ellis- og vistarheimum, og stovnum smb. § 32, stk. 2, í forsorgarlógini (Vard Verkstøð), verða 90% goldin av landskassanum og 10% av kommununum.

Av rakstrarútreiðslunum til røktar- og ellisheim verða harumframt 15% goldin av teimum luttakandi kommunum. Av húsaútreiðslum til dagstovnar fyri børn o.l. verða 40% goldin av viðkomandi kommunu og 60% av landskassanum.

Innan almannalóggávuna vóru nógvar løgtingslógir gjørdar í 70 og 80 árunum, t.d. løgtingslóg um uppískoytisveiting til einkjur frá 1977, løgtingslóg um brennistudning frá 1980 (nú: løgtingslóg um ískoyti til ávísar pensjonistar), løgtingslóg um ansingarsamsýning frá 1984, løgtingslóg um leinging av dagpeningatíðarskeiðnum frá 1987 (avtikin aftur í 1993), løgtingslóg um eykaviðbót til ávísar avlamispensjonistar frá 1987 (lógin hevur í roynd og veru avtikið seg sjálva eftir sínum egna innihaldi[2]), løgtingslóg um vardar íbúðir frá 1988, løgtingslóg um serviðbót til fólkapensjonistar fra 1988 (avtikin aftur í 1993), løgtingslóg um bjálvingarstuðul til hús hjá pensjonistum frá 1991. Hesar løgtingslógir áseta allar, at útreiðslurnar, ið standast av lógunum, verða rindaðar av landskassanum einsamallum.

Harafturat er dagpeningalógin sett í gildi frá 1. apríl 1979, har ríkiskassin rindar 40% og landskassin 60%. Frá 1. juli 1993 er dagpengalógin ein 100% landskassaútreiðsla.

Í viðmerkingum til lógaruppskotið um býtið av almannaútreiðslunum í 1992 sigur landsstýrið:

*"Ætlanin er, at spurningurin viðvíkjandi útreiðslubýtinum millum landskassan og kommunurnar innan almannaøkið í samráð við kommunurnar nú skal takast upp til viðgerðar av nýggjum, og verður miðað ímóti at kunna leggja eitt uppskot fyri løgtingið hesum viðvíkjandi innan árslók. Landsstýrið metir tó, at tað er bráðneyðugt beinanvegin at fáa nakrar greiðari reglur um býtið millum landskassan og kommurnar. Galdandi siðvenja á hesum øki er vorðin so torskild og fløkt, at*

---

[2] Lógin eigur formelt at verða avtikin!

*einans fáar kommunur hava møguleika og umsiting til at finna útav, hvussu stóran part kommunan eigur og kann rokna við at skula gjalda til almannaútreiðslur. Í lógaruppskotinum er partur kommununa settur í mun til, hvussu stóran part av tí føroyska partinum av samlaðu almannaútreiðslunum kommunurnar í dag rinda. Lógaruppskotið viðførir sostatt onga broyting fyri útreiðslustøðið hjá kommununum, sum verður á leið tað sama sum áður.*"

Reelt varð talan um eina lækking av kommununar parti av almannaútreiðslunum. Eftir galdandi skipan skuldu kommunurnar fyri fíggjarárið 1991 gjalda 44.109 mió. kr. Sambært nýggju lógini verður kommurnurnar partur av almannaútreiðslunum 42.828 mió., tvs. ein lækking av kommununar parti uppá 1.280 mió. kr. ella 2,9%. Harafturat varð kommunurnar partur av húsaútreiðslunum til dagstovnar sett til 40% fyri at koma ásamt við tey veruligu viðurskiftini, har kommunuparturin uppá 3/7 varð umroknaður til 40%. (3/7 = 42,86%).

## Núverandi lóg.

Frá 1. juli 1993 verður tað prosentvísa ríkisendurgjaldið av almannaútreiðslunum í Føroyum broytt til heildarveiting. Løgtingslógin frá 1992 verður sett úr gildi og løgtingslóg nr. 125 frá 21. mai 1993 um býtið av almannaútreiðslunum verður sett í gildi. Fyri at kommunurnar hvørki skuldu verða betur ella verri fyri, verður kommununnar partur av almannaútreiðslunum settur til 6,75% og landskassin skal gjalda 93,25%.

Av rakstrarútreiðslunum til røktar- og ellisheim verða 15% goldin av teimum luttakandi kommununum, síðani verður býtt millum allar kommunur 6,75% og landskassin rindar 78,25%. Býtið av húsaútreiðslunum til dagstovnar fyri børn o.l. verður óbroytt 40% av viðkomandi kommunu og landskassin 60%.

Frá 1. januar 1993 eru heimahjálparaskipanin og heilsu- og heimasjúkrasystraskipanin lagdar saman til Heimarøktina. Tí verður ásett, at av rakstrarútreiðslunum til Heimarøktina verða fyrst 24% rindað av landskassanum, síðani verður restupphæddin býtt við 6,75% til kommunurnar og 93,25% til landskassan. Tey 24 prosentini svara í 1993 til part heilsu- og heimasjúkrasystraskipanina av tí samlaðu játtanini til Heimarøktina. Samstundis varð ásett, at kommunurnar útvega hølir til Heimarøktina og skúlalæknaskipanina.

Eftirfylgjandi tók træta seg upp millum Heimarøktina og ávísar kommunur um, hvussu orðið "útvega" skuldi tulkast. Áður høvdu kommunurnar borið útreiðslurnar av hølum til heimasjúkrasystraskipanina. Almanna- og heilsudeildin resolveraði tá, at kommunurnar onki skuldu gjalda, men bert ávísa Heimarøktini hóskandi hølir, soleiðis at Heimarøktin skuldi bera allar hølisútreiðslur.

Við lóg nr. 1075 frá 23. desember verður m.a. forsorgarlógin broytt. Nýtt stk. 1 verður sett í § 32, stk. 2 og 3 verður hareftir til stk. 3 og 4. Løgtingslóg nr. 125 frá 21. mai 1993 um býtið av almannaútreiðslunum verður ikki rættað samsvarandi, og er helst talan um vantandi konsekvensbroyting. Mælt verður til, at tað verður broytt í eini komandi lógarbroyting, soleiðis at § 1, nr. 9, í løgtingslóg nr. 125 frá 21. mai 1993 um býtið av almannaútreiðslunum kemur ásamt við tey veruligu viðurskiftini.

Í sambandi við skipan av royndarskipan innan eldrarøkt á Sandoynni er ásett í K. nr. 167 frá 29. desember 1997, at av nettoútreiðslunum rinda kommunurnar í Sandoynni 10%, allar kommunur 6,75% og landskassin 83,25%.

## Skjal 2. Ll. nr. 125 fr 21.05.1993 um býtið av almannaútreislum v.m.

§ **1.** Lógin fevnir í § 2 um útreiðslur av:

1) útgoldnari fólkapensión við viðbótum sambært "Lov for Færøerne om folkepension",
2) útgoldnari avlamispensión og avlamisveiting við viðbótum sambært "Lov for Færøerne om invalidepension m.v."
3) útgoldnari einkjupensión við viðbótum sambært "Lov for Færøerne om offentlig forsorg",
4) barnaforsorgarútreiðslur sambært § 43, stk. 2 og 3 í "Lov for Færøerne om børneforsorg",
5) útgoldnari hjálp til einstaklingar sambært "Lov for Færøerne om offentlig forsorg",
6) heimahjálparaskipanini sambært "Lov for Færøerne om offentlig forsorg", og av heilsu- og heimasjúkrasystraskipanini,
7) útgoldnari veiting sambært "Lov for Færøerne om børnebidrag til enlige forsørgere m.v.",
8) til rakstur av røktar-, ellis- og vistarheimum, og
9) til rakstur av stovnum sambært § 32, stk. 2 í "Lov om Færøerne om offentlig forsorg".

§ **2.** Av útreiðslunum sambært § 1 verða 93,25% goldin úr landskassanum og kommunurnar gjalda 6,75%.
*Stk. 2.* Landskassin leggur út kommunanna part, og fær hann afturgoldnan soleiðis, at seinast 1. apríl hvørt ár verður gjørt upp, hvussu nógv landskassin skal hava aftur frá hvørjari kommunu sær fyri farna fíggjarárið, við at 50% verða roknað eftir seinasta fólkatali og 50% eftir skattainntøkuni í kommununi seinasta ár. Kommunurnar rinda teirra part í seinasta lagi 1. september í árinum, sum uppgjørt er.

§ **3.** Av rakstrarútreiðslunum til røktar- og ellisheim verða 15% goldin av teimum luttakandi kommunum. Síðani verður vísandi til § 1, nr. 8, broytt samsvarandi tí í § 2 ásetta bytinum, soleiðis at 6,75% verða býtt millum allar kommunur, og landskassin rindar 78,25%.

§ **4.** Av húsaútreiðslum til dagstovnar fyri børn o.l. sambært § 43, stk. 1, 2. pkt. í barnaforsorgarlógini verða 40% goldin av viðkomandi kommunu/-kommunum. Landskassin rindar 60%.

§ **5.** Kommunurnar rinda sjálvar umsitingarútreiðslurnar hjá kommunal-um sosialum deildum sambært forsorgarlógina.

§ **6.** Útreiðslur sambært almannalóg-gávuni annars verða rindaðar av landskassanum.

§ **7.** Av rakstrarútreiðslunum til Heimarøktina (heimahjálpar-, og heilsu- og heimasjúkrasystraskipanin) verða fyrst 24% rindaði av landskassanum. Síðani verður restupphæddin vísandi til § 1, nr. 6, býtt samsvarandi tí í § 2 ásetta býtinum.
*Stk. 2.* Kommunurnar útvega hølir til heimarøktina og skúlalæknaskipanina.

§ **8.** Henda lóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og verður galdandi frá og við fíggjarárinum 1993.
*Stk. 2.* Samstundis fer løgtingslóg nr. 3 frá 6. januar 1983 um býti av útreiðslunum til heimasjúkrasystra-, heilsusjúkrasystra- og skúlalækna-skipanina og løgtingslóg nr. 98 frá 23. juni 1992 um býti av almannaútreiðs-lunum úr gildi.

## Skjal 3. Yvirlit yvir hvat kommunurnar rinda sambært lógina um býtið av almannaútreiðslum, yvir meir- og minni útreiðslur hjá kommununum um lógin verður avtikin og barnaansingin verður lagt út til kommunurnar.

| Kommuna<br>Navn | Býtið av Almannaútreiðslunum 1998 | Býtið av komm. parti av ellisheimunum 1998 | Tilskot úr landskassanum barnaansing 1998 | Meirútreiðsla fyri kommunurnar 1998 |
|---|---|---|---|---|
| Bíggjar kommuna | 62.342 | 61.673 | | -124.015 |
| Eiðis kommuna | 722.247 | 204.061 | 394.935 | -531.373 |
| Elduvíkar kommuna | 89.977 | 21.599 | | -111.576 |
| Fámjins kommuna | 128.969 | 36.575 | | -165.544 |
| Fuglafjarðar kommuna | 1.539.526 | 426.475 | 2.565.327 | 599.326 |
| Fugloyar kommuna | 48.565 | 12.388 | | -60.953 |
| Funnings kommuna | 106.527 | 29.738 | | -136.265 |
| Gjáar kommuna | 72.611 | 21.844 | | -94.455 |
| Gøtu kommuna | 1.005.419 | 292.460 | 564.571 | -733.308 |
| Haldórsvíkar kommuna | 272.309 | 53.356 | 123.592 | -202.073 |
| Hests kommuna | 49.667 | 7.315 | | -56.982 |
| Hósvíkar kommuna | 244.174 | 0 | 354.612 | 110.438 |
| Hovs kommuna | 132.245 | 39.341 | | -171.586 |
| Húsar kommuna | 63.311 | 13.684 | | -76.995 |
| Húsavíkar kommuna | 155.626 | 65.241 | | -220.867 |
| Hvalbiar kommuna | 763.030 | 237.277 | | -1.000.307 |
| Hvalvíkar kommuna | 340.556 | 0 | 164.551 | -176.005 |
| Hvannasunds kommuna | 452.098 | 138.877 | 72.893 | -518.082 |
| Kirkjubøar kommuna | 216.597 | 33.145 | 731.485 | 481.743 |
| Klaksvíkar kommuna | 4.830.164 | 1.517.663 | 2.751.935 | -3.595.892 |
| Kollafjarðar kommuna | 941.288 | 53.356 | 809.949 | -184.695 |
| Kunoyar kommuna | 141.833 | 42.986 | | -184.819 |
| Kvívíkar kommuna | 602.755 | 0 | 697.635 | 94.880 |
| Leirvíkar kommuna | 865.205 | 243.419 | 523.578 | -585.046 |
| Miðvágs kommuna | 978.207 | 482.149 | 451.652 | -1.008.704 |
| Mikladals kommuna | 78.959 | 13.510 | | -92.469 |
| Mykinesar kommuna | 15.530 | 20.050 | | -35.580 |
| Nes kommuna | 1.157.630 | 328.878 | 794.904 | -691.604 |
| Nólsoyar kommuna | 231.316 | 36.539 | | -267.855 |
| Oyndafjarðar kommuna | 168.647 | 45.040 | 50.155 | -163.532 |
| Porkeris kommuna | 374.553 | 111.262 | 89.191 | -396.624 |
| Runavíkar kommuna | 2.458.100 | 652.183 | 1.901.498 | -1.208.785 |
| Saksunar kommuna | 28.640 | 0 | | -28.640 |
| Sandavágs kommuna | 694.781 | 381.785 | 324.878 | -751.688 |
| Sands kommuna | 534.982 | 235.450 | 306.776 | -463.656 |
| Sjóvar kommuna | 1.002.291 | 269.720 | 508.275 | -763.736 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Skála kommuna | 650.480 | 175.371 | | -825.851 |
| Skálavíkar kommuna | 175.877 | 66.878 | | -242.755 |
| Skopunar kommuna | 500.454 | 208.885 | 141.532 | -567.807 |
| Skúvoyar kommuna | 78.368 | 0 | | -78.368 |
| Sumbiar kommuna | 420.023 | 130.625 | | -550.648 |
| Sunda kommuna | 492.559 | 141.885 | 744.487 | 110.043 |
| Svínoyar kommuna | 58.834 | 13.942 | | -72.776 |
| Sørvágs kommuna | 997.733 | 403.147 | 666.192 | -734.688 |
| Tórhavnar kommuna | 17.959.603 | 4.163.494 | 33.932.482 | 11.809.385 |
| Tvøroyrar kommuna | 1.887.991 | 552.314 | 2.299.776 | -140.529 |
| Vágs kommuna | 1.414.854 | 442.068 | 549.844 | -1.307.078 |
| Vestmanna kommuna | 1.225.402 | 108.758 | 584.897 | -749.263 |
| Viðareiðis kommuna | 318.449 | 104.003 | 110.250 | -312.202 |
| Tilsamans | 47.751.305 | 12.640.409 | 53.211.852 | -7.179.862 |

# Skjal 4. Yvirlit yvir dagstovnar og dagrøktir í 1999.

## Dagstovnar og dagrøktarskipanir í 1999 (við nýggjum aktiviteti)

| Navn á stovni/røkt og staður: | Ár upp í 2 ár | Ár 3 – 7 ár | Ár upp í 10 ár | Íalt | Viðmerkingar: |
|---|---|---|---|---|---|
| **Norðoyggjar** | | | | | |
| Dagrøktarskipanin á Viðareiði | | | 20 | **20** | Kommunal skipan |
| Dagrøktarskipanin í Hvannasundi | | | 20 | **20** | Kommunal skipan |
| Dagrøktarskipanin í Klaksvík | | | 90 | **90** | Kommunal skipan |
| Dagstovnurin "Mylnihúsið" | 12 | 24 | 30 | **66** | Sjálvsognarstovnur |
| Dr. Margrethu Barnagarður | 12 | 79 | | **91** | Sjálvsognarstovnur |
| **Tilsamans Norðoyggar** | **24** | **103** | **160** | **287** | |
| **Eysturoy** | | | | | |
| Dagrøktarskipanin á Eiði | | | 36 | **36** | Kommunal skipan |
| Dagrøktarskipanin á Skála | | | 20 | **20** | Kommunal skipan |
| Dagrøktarskipanin á Strondum | | | 40 | **40** | Kommunal skipan |
| Dagrøktarskipanin á Toftum | | | 80 | **80** | Kommunal skipan |
| Dagrøktarskipanin í Fuglafirði | | | 15 | **15** | Kommunal skipan |
| Dagrøktarskipanin í Gøtu | | | 50 | **50** | Kommunal skipan |
| Dagrøktarskipanin í Leirvík | | | 40 | **40** | Kommunal skipan |
| Dagrøktarskipanin í Oyndafirði | | | 10 | **10** | Kommunal skipan |
| Dagrøktarskipanin í Runavík | | | 65 | **65** | Kommunal skipan |
| Dagstovnurin á Oyri | 12 | 20 | | **32** | Kommunalur stovnur |
| Dagstovnurin í Fuglafirði | 20 | 40 | | **60** | Kommunalur stovnur |
| Kongshavnar Barnag. & Vøggust. | 12 | 42 | | **54** | Sjálvsognarstovnur |
| **Tilsamans Eysturoy** | **44** | **102** | **356** | **502** | |
| **Norðstreymoy** | | | | | |
| Dagrøktarskipanin í Haldórsvík | | | 22,5 | **23** | Kommunal skipan |
| Dagrøktarskipanin í Hósvík | | | 38 | **38** | Kommunal skipan |
| Dagrøktarskipanin í Hvalvík | | | 20 | **20** | Kommunal skipan |
| Dagrøktarskipanin í Kollafirði | | | 75 | **75** | Kommunal skipan |
| Dagrøktarskipanin í Vestmanna | | | 50 | **50** | Kommunal skipan |
| Dagstovnurin í Kvívík | | 30 | | **30** | Kommunalur stovnur |
| **Tilsamans Norðstreymoy** | **0** | **30** | **206** | **236** | |
| **Suðurstreymoy** | | | | | |
| Barnaansingin í KFUM | | | 20 | **20** | Sjálvsognarstovnur |
| Barnagarðurin "´Vípan" Vípuvegur | | 30 | | **30** | Sjálvsognarstovnur |
| Barnagarðurin á Konmansmýru | | 60 | | **60** | Sjálvsognarstovnur |
| Barnagarðurin við Velbastaðvegin | | 60 | | **60** | Sjálvsognarstovnur |
| Býlingahúsið á Norðasta Horn | 12 | 33 | | **45** | Kommunalur stovnur |
| Býlingahúsið á Ternuryggi | 12 | 22 | | **34** | Kommunalur stovnur |
| Býlingahúsið inni á Gøtu | | 42 | | **42** | Kommunalur stovnur |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Býlingahúsið Millum Gilja | 12 | 22 | | **34** | Kommunalur stovnur |
| Býlingahúsið Undir Brúnni | 24 | 34 | | **58** | Kommunalur stovnur |
| Býlingahúsið Undir Fjalli | 12 | 42 | | **54** | Kommunalur stovnur |
| Býlingahúsið Vesturi á Flat | 12 | 42 | | **54** | Kommunalur stovnur |
| Dagrøktarskipanin í Tórshavn | | | 300 | **300** | Kommunal skipan |
| Dagstovnurin "Lítliskógur" | 30 | 42 | | **72** | Kommunalur stovnur |
| Dagstovnurin á Argjum | 12 | 48 | | **60** | Sjálvsognarstovnur |
| Dagstovnurin á Velbastað | 10 | 20 | | **30** | Kommunalur stovnur |
| Dagstovnurin í Hoyvík | 30 | 42 | | **72** | Sjálvsognarstovnur |
| Dr. Ingridar M. Barnagarður | | 80 | | **80** | Sjálvsognarstovnur |
| Frítíðarskúlan í Tórshavn | | | 250 | **250** | Kommunalur stovnur |
| Miðstovnurin í Gundadali | | | 30 | **30** | Kommunalur stovnur |
| Skt. Josefs Barnagarður | | 80 | | **80** | Sjálvsognarstovnur |
| Stella Maris Vøggustova | 52 | | | **52** | Sjálvsognarstovnur |
| Útibarnagarður í Havnardali | | 20 | | **20** | Kommunalur stovnur |
| Vøggustovan á Konmansmýru | 32 | | | **32** | Sjálvsognarstovnur |
| Vøggustovan við Velbastaðvegin | 42 | | | **42** | Sjálvsognarstovnur |
| **Tilsamans Suðurstreymoy** | **292** | **719** | **600** | **1.611** | |
| | | | | | |
| **Vágarnar** | | | | | |
| Dagrøktarskipanin í Miðvági | | | 45 | **45** | Kommunal skipan |
| Dagrøktarskipanin í Sandavági | | | 30 | **30** | Kommunal skipan |
| Dagrøktarskipanin í Sørvági | | | 15 | **15** | Kommunal skipan |
| Dagstovnur í Sørvági | | 25 | | **25** | Sjálvsognarstovnur |
| **Tilsamans Vágarnar** | **0** | **25** | **90** | **115** | |
| | | | | | |
| **Sandoy** | | | | | |
| Dagrøktarskipanin á Sandi | | | 30 | **30** | Kommunal skipan |
| Dagrøktarskipanin í Skopun | | | 20 | **20** | Kommunal skipan |
| **Tilsamans Sandoy** | **0** | **0** | **50** | **50** | |
| | | | | | |
| **Suðuroy** | | | | | |
| Dagrøktarskipanin á Tvøroyri/Hvalba | | | 30 | **30** | Kommunal skipan |
| Dagrøktarskipanin í Porkeri | | | 20 | **20** | Kommunal skipan |
| Dagrøktarskipanin í Vági | | | 45 | **45** | Kommunal skipan |
| Dagstovnurin í Trongisvági | 12 | 60 | | **72** | Kommunalur stovnur |
| **Tilsamans Suðuroy** | **12** | **60** | **95** | **167** | |
| | | | | | |
| **Tilsamans fyri alt landið** | **372** | **1.039** | **1.557** | **2.968** | |

# Skjal 5. Framrokningar ár 2000.

Barnaansing ár 2000
(framroknað út frá verandi virksemi og 40% í landskassaparti til rakstur)

## Sjálvsognarstovnar

| Navn: | Lønir í 1999 +3% | Lønir í 2000 +3% | Rakstur | Løn/ rakstur íalt | Húsaútr. | Eyka húsaútr | Húsaútr. Íalt | íalt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Sjálvsognarstovnar tilsamans | 32.754.731 | 33.737.373 | 4.393.086 | 38.130.459 | 8.990.987 | 580.285 | 9.571.272 | 47.701.731 |

## Kommunalir stovnar

| Navn: | Lønir í 1999 +3% | Lønir í 2000 +3% | Rakstur | Løn/ rakstur íalt | Húsaútr. | Eyka húsaútr | Húsaútr. Íalt | íalt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Kommunalir stovnar tilsamans | 36.371.197 | 37.462.333 | 5.257.925 | 42.720.258 | 13.073.213 | 93.860 | 13.167.073 | 55.887.331 |

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagstovnar tilsamans | 69.125.928 | 71.199.706 | 9.651.011 | 80.850.717 | 22.064.200 | 674.145 | 22.738.345 | 103.589.062 |

## Dagrøktarskipanir [3]

| Navn: | Lønir í 1999 +3% | Lønir í 2000 +3% | Rakstur | Løn/ rakstur íalt | Húsaútr. | Eyka húsaútr | Húsaútr. Íalt | íalt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagrøktir íalt | 49.330.433 | 50.810.346 | 0 | 50.810.346 | 0 | 0 | 0 | 50.810.346 |

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Landskassapartur | 47.382.544 | 48.804.021 | 3.860.404 | **52.664.425** | 13.238.520 | 404.487 | **13.643.007** | **66.307.432** |
| Kommupartur | 35.536.908 | 36.603.016 | 2.895.303 | **39.498.319** | 8.825.680 | 269.658 | **9.095.338** | **48.593.657** |
| Foreldrapartur | 35.536.908 | 36.603.016 | 2.895.303 | **39.498.319** | | | | **39.498.319** |

[3] Tórshavnar Kommuna hevur gjørt semju við Tórshavnar Kommunala Starvs- og Tænastumannafelag, sum viðførir eina lønarhækking størri enn 3%.